

## Vieira: Eg eri betri nú

33 ára gamli franski fótbóltsspælarain Patrick Vieira skal komandi hálva árið hjálpa enska felagnum Manchester City. Fyri nógvum árum síðani var hann miðvallargeneralur í Arsenal, og hóast fleiri halda, at Vieira ikki er tann sami spælarin sum tá, so heldur Vieira sjálvur, at hann er í góðum formi. – Eg eri blivin ein betri spælari við teimum royndum, sum eg havi fingið. Eg komi aftur til Premier League sum ein betri spælari, enn tá eg fór, sigur Vieira við SportingLife.

# Chelsea vann á kavanum

**Hóast Chelsea ikki spældi um vikuskiftið, eru teir at meta sum stóri sigursharrin. Manchester United og Arsenal høvdu nevniliga møguleikan at yvirtaka oddasessin, men tað miseydnaðist teimum**




Rólant Waag Dam




Uttan at spæla, kundu Chelsea-spælararnir kortini frøast um, at teir framvegis eru væl og virðiliga á odda í Premier League, tí bæði Manchester United og Arsenal settu stig til

Heili sjey dystir vórðu útsettir í Premier League um vikuskiftið. Teirra millum útivallardysturin hjá Chelsea í móti Hull. So heldur enn at stríðast í kuldanum, so kundu leikararnir á Londonliðnum heldur sita heima á sofuni og fegnast, um teir báðar javnleikirnar, ið Manchester United og Arsenal hálaðu í hús.

Hetta hevði nevniliga við sær, at Chelsea framvegis er fremsta liðið í Premier League – eitt stig frammanfyri Manchester United, men við einum dysti til góðar. Arsenal er trý stig aftan fyri Chelsea, bæði liðini hava spælt 20 dystir.

Hesin veruleiki fløvar hjá teimum, sum halda við Chelsea í ísakalda Onglandi.

### Birmingham snýtti United

Hinvegin var tað lítið, ið fløvaði hjá Sir Alex Ferguson, sum við liði sínum vitjaði á St. Andrew's har tey máldu seks kuldastig leygardagin.

Ikki tí, Manchester United stóð fyri tí mesta og hevði fleiri naskar atsøknir. Kortini var tað Birmingham, sum legði seg á odda í fyrra hálvleiki, tá Jerome fekk kúluna í kassan, eftir nakað av trunkaspælið í brotsteiginum í samband við eitt hornaspark.

Birmingham hevði onkran einstakan møguleika at økja um leiðsluna, men tað var Manchester United, sum hótti og trýsti mest.

Tað eydnaðist teimum eisini at javna, tá eitt skot frá Evra tók í ein møtstøðuleikara, broytti kós og snýtti málverjan. Tá var hálvur tími eftir at leika.

### Kolldømdi kolldøming

Merkisvert var, at linjuverjin í hesum sambandi hevði flaggið á lofti og veiftraði fyri rangstøðu. Dómarin fór beina kós yvir til hansara, og eftir at hava tosað saman, peikaði dómarin niðan á miðvøllin og málið stóð við. Aftrat hesum legði dómarin heilar seks minuttir aftrat vanligu leiktíðini.

Hetta merkir tó ikki, at Manchester United hevði ein tólvta mann á vøllinum. Fimm minuttir fyri leiklok vísti dómarin Fletcher av vøllinum. Skotin sá gult fyri aðru ferð, tá hann á miðvøllinum – og í eini lutfalsliga vandaleysari støðu – gjørdi eitt minni fríspark.

Hvussu er og ikki, so endaði dysturin við javnleiki og tað kundi Birmingham fegnast mest um. Ikki minst tí, at hetta er tólvti dysturin á rað, har liðið er ósigrað – sjey sigrar og fimm javnleikir er tað blivið til síðani 17. oktober, tá Birmingham tapti 3-1 á útivølli móti Arsenal.

Hinvegin var ein javnleikur í móti einum uppflytara í Premier League ikki júst tann uppreisnin, Manchester United hevði ætlað eftir tapið fyri Leeds í FA Cup.

### Ikki vunnið í 13 ár

Meðan teir í Manchester helst iðra seg um mistu stigini, so kunnu tey hjá Arsenal bara fegnast um tað eina stigið móti Everton. Hesum syrgdi innskifti Rosicky, tá hann í yvirtíðini syrgdi fyri, at bólturin fór í málið umvegis ein mótstøðuleikara.

Hetta var ein herskin biti at svølgja hjá venjaranum Moyes, tí í tveimum førum høvdu hansara menn havt leiðsluna, men í 92. minutti vórðu trý stig umsett til eitt.

Ikki tí, trý stig høvdu Moyes og hansara menn uppiborið, men málið hjá Arsenal var bert ein staðfesting av hagtølunum, sum siga, at Everton hevur tað trupult á útivølli móti Arsenal. Seinasti Everton vann ein slíkan dyst, var í januarmánaði í 1996.

### Sjey dystir vanta

Í kvøld er dystur millum Manchester City og Blackburn á skránni. Nær hinir sjey útsettu dystirnir verða spældir, er ikki greitt enn. Men við bæði FA Cup og Carlington Cup dystum á skránni í vikuni er greitt, at dystirnir ikki verða spældir fyrr enn einaferð seinni.

## Úrslitini í Premier League:

| | |
|---|---|
| Birmingham-Manchester United | 1-1 |
| Arsenal-Everton | 2-2 |

### Premier League

| | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Chelsea | 20 | 14 | 3 | 3 | 45 | 16 | 29 | 45 |
| 2 Man Utd. | 21 | 14 | 2 | 5 | 46 | 19 | 27 | 44 |
| 3 Arsenal | 20 | 13 | 3 | 4 | 53 | 23 | 30 | 42 |
| 4 Tottenham | 20 | 11 | 4 | 5 | 42 | 22 | 20 | 37 |
| 5 Man City | 19 | 9 | 8 | 2 | 38 | 27 | 11 | 35 |
| 6 Aston Villa | 20 | 10 | 5 | 5 | 29 | 18 | 11 | 35 |
| 7 Liverpool | 20 | 10 | 3 | 7 | 37 | 25 | 12 | 33 |
| 8 Birmingham | 21 | 9 | 6 | 6 | 21 | 19 | 2 | 33 |
| 9 Fulham | 20 | 7 | 6 | 7 | 26 | 22 | 4 | 27 |
| 10 Stoke | 20 | 6 | 6 | 8 | 18 | 25 | -7 | 24 |
| 11 Sunderland | 20 | 6 | 5 | 9 | 28 | 31 | -3 | 23 |
| 12 Everton | 20 | 5 | 8 | 7 | 28 | 34 | -6 | 23 |
| 13 Blackburn | 20 | 5 | 6 | 9 | 20 | 35 | -15 | 21 |
| 14 Burnley | 20 | 5 | 5 | 10 | 22 | 40 | -18 | 20 |
| 15 Wolves | 20 | 5 | 4 | 11 | 17 | 36 | -19 | 19 |
| 16 Wigan | 19 | 5 | 4 | 10 | 21 | 44 | -23 | 19 |
| 17 West Ham | 20 | 4 | 6 | 10 | 28 | 37 | -9 | 18 |
| 18 Bolton | 18 | 4 | 6 | 8 | 26 | 36 | -10 | 18 |
| 19 Hull | 20 | 4 | 6 | 10 | 20 | 42 | -22 | 18 |
| 20 Portsmouth | 20 | 4 | 2 | 14 | 18 | 32 | -14 | 14 |